| | Býráðsfundur<br>30. desember 2016 | Blað nr.: 13756<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. desember 2016 **Kl.** 13:30
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 352/16 – 354/16**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Jan Christiansen – fyri Sjúrður Olsen
Sigrún Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eirikdsóttir
Mikael H. Viderø
Jóan Petur Hentze
Randi Saxov
Sigurð Ó. Vang

**LUTTÓKU IKKI:**
Sjúrður Olsen
Annfinn Brekkstein
Marin Katrina Frýdal
Jákup Dam

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 352/16 | 16/01984-7 | Sjúrður Olsen: farloyvi frá býráðnum | 13758 |
| 353/16 | 16/02717-6 | Áheitan vegna kirkjuráðið á Argjum um fund um ymiskar fyrispurningar í sambandi við byggjan av nýggjar kirkju á Argjum | 13759 |
| 354/16 | 16/04398-2 | Umsókn frá Skótaliði KFUM's um 1/3 av kostnaðinum fyri smáttu í Havnardali í stuðli | 13761 |

## ***352/16 Sjúrður Olsen: farloyvi frá býráðnum***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 352/16 | 16/01984-7 |

**Málslýsing:**
Sjúrður Olsen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jan Christiansen, eru loknar.

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Samtykt at taka umbønina til eftirtektar.

# 353/16 Áheitan vegna kirkjuráðið á Argjum um fund um ymiskar fyrispurningar í sambandi við byggjan av nýggjar kirkju á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 406/16 | 16/02717-6 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 326/16 | 16/02717-6 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.12.2016 | 315/16 | 16/02717-6 |
| 4 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 353/16 | 16/02717-6 |
| 5 Fíggjarnevndin | | | 16/02717-6 |

**Málslýsing:**
Kirkjuráðið á Argjum upplýsir í skrivi dagf. 1. september 2016, at kirkjuráðið er komið so mikið væl áleiðis við fyrireikingunum at byggja nýggja kirkju á Argjum, at greiða skal fáast á teimum fíggjarligu viðurskiftunum. Í hesum sambandi heitir kirkjuráðið á Tórshavnar kommunu um at vera við í hesi tilgongd.
Víst verður á møguleikan, at kommunan keypir verandi bygning, matr. nr. 99a og grundøki 99b, tilsamans virðismett til 4,9 mió. Harumframt, at kommunan letur fígging til framsíður og tekju av Rheinzink, mett til kr. 5 mió, og at kommunan fíggjar ella yvirtekur arbeiðið við uttanumøkinum, mett til kr. 4 mió.
Í seinni skrivi vísir kirkjuráðið á, at aðrar kirkjur hava fingið slíka fígging frá kommununi, nevnt verður Vesturkirkjan, Havnar kirkja og Hoyvíkar kirkja.
Fyrisitingin metir, at til ber hjá kirkjuráðnum at selja verandi bygning í fríari sølu fyri prís, ið samsvar við virðismetingina.
Í sambandi við byggingina av Hoyvíkar kirkju, játtaði kommunan fígging til uttanumøki og byggilistarligu útsjóndina, sum var kopartekjan.
Mett verður, at í fyrsta umfarið eigur kommunan at taka støðu til, hvørt kommunan vil taka lut í byggigini, hvat listarligu útsjóndini viðvíkur, tað er Rheinzinkið, sum mett er til kr. 5 mió. Spurningur um fígging til útiøkið kann takast upp aftur seinni, tá byggingin er komin longri áleiðis, evt. sum partur av fríðkan av býnum.
Verður fígging latin, verður mett, at henda kann latast av kontu 5370 stuðul til íløgur, sum mentamálanevndin hevur um hendi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til, at tilsøgn verður latin kirkjuráðnum á Argjum um íløgufígging av kontu 5370 stuðul til íløgur í mesta lagi kr. 5 mió til byggilistarligu útsjóndina, tað er framsíður og tekja av Rheinzinki, at rinda út, tá arbeiðið er gjørt. Kirkjuráðið skal í hesum sambandi upplýsa, hvat ítøkiligi kostnaðurin av hesum verður, og nær útreiðslan væntast at falla.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atvkøðugreiðslu at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Sambært roknskaparkunngerðini grein 13, stk 7, skulu tilsagnir verða skrásettar sum útreiðsla, tá bindandi tilsøgn verður givin. Tilmælið og samtyktin omanfyri er at meta sum slík bindandi tilsøgn. Tað merkir, at upphæddin skal rakstrarførast í játtanarárinum sum eykajáttan. Á fyriliggjandi grundarlag ber sostatt ikki til at samtykkja slíka tilsøgn, tí játtan er ikki til í fíggjarætlanini.

Gerast skal somuleiðis vart við, at sambært leiðreglunum til kontu 5370 stuðul til íløgur, so er endamálið við játtanini at stuðla íløgur í bygging, sum ítróttafeløg og frítíðarfelagsskapir standa fyri, tvs. almannagagnligir felagsskapir. Henda høvuðsregla fevnir sostatt ikki um kirkjur. Rættari hevði verið, at ein møgulig játtan verður fingin til vega á løguætlanini.

Fyrisitingin skilir politiska viljan soleiðis, at ynskið er at geva Argja kirkju eina ikki bindandi ætlanarfráboðan um, at kommunan er sinnað at lata fígging til endamál, sum kommunan hevur veitt øðrum kirkjum í sambandi við byggilistarligu útsjóndina, tá ið byggingin er aktuel, og at býráðið, ið tá situr, tekur endaliga avgerð um møguliga játtan og fígging.

**Tilmæli:**
Við støði í hesum mæla kommunustjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin til at boða kirkjuráðnum á Argjum frá, at býráðið er sinnað at lata fígging til byggislistarligu útsjóndina, og at málið um játtan og fígging verður tikið uppaftur til endaliga avgerð, tá byggingin er aktuel.

**Mentamálanevndin 22. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við mentamálanevndini.

Teir býráðslimir, ið atkvøddu fyri, vóru Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Bogi Andreasen.

Elin Lindenskov, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr greiddu ikki atkvøðu.

## 354/16 Umsókn frá Skótaliði KFUM's um 1/3 av kostnaðinum fyri smáttu í Havnardali í stuðli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 30.12.2016 | 317/16 | 16/04398-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 30.12.2016 | 437/16 | 16/04398-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 354/16 | 16/04398-2 |

**Málslýsing:**
Søkt verður um stuðul til 1/3 av kostnaðinum av bygging av skótasmáttu í Havnardali.

KFUM heldur til við Hoyvíksvegin, sum er mitt í býnum, og sostatt er ikki atgongd til náttúruna har. Tí kom hugskotið um at byggja ein smáttu uttan fyri býin. Í umsóknini stendur m.a.:

"Av hesum ávum valdu vit í Skótaliði KFUM's at søkja Tórshavnar kommunu um eitt fríøki í kommununi, har vit kundu lata eini skótahús byggja. Vit vóru sera fegin, tá kommunan vísti okkum á økið úti í Havnardali.

Í trý ár hava vit verið í holt við smáttubygging – tó mangla vit enn at byggja tjaldvallir, legubálsøki og bálstað okkara. Orsakað av áður nevndum fíggjarligum inntøkum okkara eru vit ikki før fyri at lata tjaldvøll og bálstað byggja.

Av hesum ávum vilja vit søkja um 1/3 av kostnaðinum á smáttuni í Havnardali."

Sambært uppgerð yvir kostnaðin er samlaði kostnaðurin kr. 1.233.143,26, tá íroknað kostnaðarmeting av sjálvbodnum arbeiði. Roknað er við fullum MVG.

Umsóknin er at viðgera sambært leiðreglum um at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, sum samtykt av mentamálanevndini 03.09.2015.

Umsøkjarin hevur latið inn upplýsingar um kostnað, lýsing av byggiætlanini, sum er um at vera liðug. Sambært leiðreglunum §3, stk. 3, kann stuðulin í mesta lagi vera 30% av metta byggikostnaðinum, umframt treytað av, at játtan er tøk á fíggjarætlanini og at neyðug loyvi eru fingin til byggingina. Verkætlanin fekk byggiloyvi 20.01.2014.

Á kontu 5370 fíggjarárið 2016 er allur peningurin disponeraður. Fyri fíggjarárið 2017 eru avsettar kr. 500.000 á kontuni, harav kr. 70.000 longu eru játtaðar, umframt at nakrar umsóknir eru til viðgerðar. Sambært §3, stk. 5 í leiðreglunum kann stuðul ikki verða latin til bygging, sum er byrjað ella liðug. Í hesum føri er verkætlanin sum upplýst um at vera liðug.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini frá at játta stuðul, vísandi til leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur. Sambært leiðreglunum skal søkjast um stuðul, áðrenn arbeiðið byrjar.

**Mentamálanevndin 30. desember 2016:** Nevndin samtykti at játta kr. 100.000,00 sum stuðul til smáttuna, av kontu 5370 stuðul til íløgur, sum frávik og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 14:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Jan Christiansen |
| | Sigrún Amalia Mohr | |